## Langir lastbilar í Danmark

Í hesum mánaðinum verður loyvt at koyra við munandi størri lastbilum í Danmark enn higartil hevur verið loyvt. Talan er um eina trý ára royndartíð, og bilarnir hava bert loyvi at koyra á motorvegum og nøkrum ávísum øðrum vegastrekkjum. Samlaða longdin, sum verður loyvd, verður 25,25 metar. Hetta er 6,5 m longri enn higartil hevur verið loyvt, og mest loyvda vektin verður nú 60 tons í mun til 48 tons, sum higartil hevur verið loyvt. Til dømis er loyvt at koyra við einum lastbili sum er 12 metrar langur og hevur ein vogn aftur úr sum eisini er umleið 12 metrar langur. Samlaða longdin má ikki fara uppum 25,25 metrar. Endamálið við at geva loyvi til yvir 25 m longu lastbilarnar er t.d. at minka um luftdálkingina við tað at tveir lastbilar nú kunnu koyra somu nøgd sum annars tríggir lastbilar skulu til, tá mest loyvda londin var líka yvir 18 metrar.



# Absalon umsett bók um Titanic

**Um eina góða viku kemur nýggj og áhugaverd bók í bókabúðirnar. Hetta er ein bók um skipsvanlukkuna við Titanic, sum fyrrverandi skiparin og rithøvundurin, Absalon Absalonsen úr Vági, hevur umsett eftir amerikanska rithøvundan, Walter Lord**

BÓKAÚTGÁVA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Titanic var heimsins største skip, tá tað fórst á leiðini eystur av Ný Foundlandsbankanum hin 14. apríl í 1912*

Í nógv ár sigldi Absalon Absalonsen sum skipari, men seinnu árini hevur hann fingist nógv við at skriva.

Fyrsta bókin hjá honum kom út í 2004. Hetta var skaldsøgan "Hjálp úr neyð", sum er útseld, og árið eftir kom framhald av hesi bók, sum rithøvundurin kallaði "Sornhúsfólkini". Báðar hesar bøkurnar eru so gott sum útseldar.

Seinasta bókin undan hesari, sum nú kemur í bókasølurnar, var bókin "Jóan Petur hjá Mouritsi", sum kom í 2006.

Henda bókin varð seld í umleið 2.000 eintøkum.

### Um Titanic

Nú kemur so rithøvundurin við bókini um Titanic, sum hann hevur týtt úr enskum. Í sínum arbeiði hevur Absalon eisini havt donsku týðingina við hondina, men hann hevur lagt seg eftir at vera trúgvur móti enska upprunatekstinum.

Bókin um Titanic verður umleið 230 síður, og hon hevur einar 70-80 myndir, tær flestu úr upprunabókini.

Kostnaðurin verður 300 krónur.

- Eg havi roynt at klætt bókina í ein vanligan føroyskan málburð, sigur rithøvundurin, sum er kendur fyri at orða seg lætt og væl.



*Skiparin og rithøvundurin, Absalon Absalonsen, kemur nú við síni fjórðu bók – hesaferð um skipsvanlukkuna við Titanic*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Hugtakandi søga

- Søgan um Titanic hevur heilt frá barnaárunum hugtikið meg, og í mínum hugaheimi stendur hon sum ein klár áminning um, at einki mannaverk er fullkomið. Bestu skipsbyggjarar gera mistøk, og tað gera royndir sjómenn við hægstu útbúgving eisini.

Absalon sigur, at táverandi heimsins størsta og best útgjørda skip skuldi ikki kunna søkka. Skipið var eini 66.000 tons, og tað var mannað við útvaldum og royndum sjómonnum – og so kortini fór Titanic til botns á sínum fyrsta túri.

- Skipsvanlukkan við Titanic hin 14. apríl í 1912 er ein sorgarleikur av teimum størstu, sum heimurin kennir. Fáur dugdi at ímynda sær, at slíkt kundi henda í veruleikanum.

Rithøvundurin sigur, at við Titanic, sum fórst á leiðunum eystur av Ný Foundlandsbankanum, vóru umleið 2300 fólk, harav 705 bjargaðust, meðan eini 1600 lótu lív.

- Skipið hevði siglt í fýra dagar, tá tað sigldi á eitt ísfjall og endaði við havsins botn, sigur hann.

### 63 siga søgu

Bókin um Titanic byggir á samrøður við 63 fólk, sum siga sína søgu um hendingina.

- Nú skaldsøgur eru skrivaðar við støði í hesi skipsvanlukku og filmir eisini eru gjørdir, fekk eg hug at leita bókina framaftur og helt, at tað hevði verið áhugavert at havt hana á føroyskum. Eg fekk mær hendur á upprunaútgávuni á enskum og havi síðan roynt at latið søguna í ein vanligan føroyskan málbúna, sum rithøvundurin tekur til.

Hann sigur seg vóna, at henda útgáva verður til gleði og gagns fyri nógvar lesarar.

Vit kunnu leggja aftrat, at Walter Lord skrivaði 13 bøkur tilsamans. Hetta eru allar dokumentarsøgur og allar sonevndar "bestsellers".

- Walter gav sær stundir at leita upp 63 av teimum bjargaðu eftir vanlukkuna. Hann fekk frágreiðingar teirra og setti tær saman til eina dramasøgu, har hendingarnar vera endurgivnar frá minutti til minutt so hvørt, sum tær fóru fram, sigur høvundurin, Absalon Absalonsen.

# Eingin trupulleiki ikki at vera valdur

**- Onkur spurdi meg valkvøldið, hvussu tað kendist ikki at vera afturvaldur. Eg segði, at hetta er eingin trupulleiki – og at tað er ein annar dagur í morgin. At vera vónsvikin, tími eg ikki, sigur Kristian Eli Zachariassen, sum ikki varð afturvaldur á kommunuvalinum í Klaksvík**

FALL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

34 ára gamli Kristian Eli Zachariassen hevur verið býráðslimur fyri Sjálvstýrisflokkin í Klaksvík seinastu fýra árini, men á valinum týsdagin varð hann ikki afturvaldur. Umboðið hjá Sjálvstýrisflokkinum í Klaksvíkar býráð er nú Jógvan Skorheim, sum fekk 134 atkvøður. Hann er ungur, men hevur áður verið uppstillaður, bæði til býráðs-og løgtingsval.

- Nei, eg eri slett ikki vónsvikin. Tað broytir ikki fakta, og hetta ger eisini, at betri stundir vera til annað. Eg ætlaði ikki at stilla uppaftur hesaferð, men endaði kortini á listanum. Í fyrsta lagi havi eg rikið ov lítið og illa.

Tað sigur Kristian Eli Zachariassen, sum annars hevur sítt dagliga starv hjá Føroya Tele.

Valkvøldið spurdi onkur Kristian, hvussu tað kendist ikki at vera afturvaldur.

- Eg segði, at hetta er eingin trupulleiki – og at tað er ein annar dagur í morgin. At vera vónsvikin, tími eg ikki, tí tað kanst tú ikki brúka til nakað, sigur Kristian, sum í hvussu er hevur gjørt av ikki at stilla uppaftur á komandi løgtingsvali.

Hann sigur seg ikki tíma at stilla upp bara fyri at stilla upp.

- Eg fekk 75 atkvøður hesaferð – og misti einar 18 í tali. Men tað eru hóast alt hesi 75, sum á valinum settu sítt álit á meg.

Kristian Eli Zachariassen sigur, at óhugsandi er ikki, at hann fer at stilla uppaftur einaferð seinni.

- Sum er, verður tað ikki, tí eg tími ikki at brúka pening upp á eitt komandi løgtingsval, tá tú ikki verður valdur kortini, leggur hann aftat.